VINNU SÍÐURNAR

Nr. 174 • mikudagur • 14. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nógvar kvotur á muni



*Tað tykjast vera greiðar ábendingar um, at handilin við Vesturvón varð gjøgnumførdur fyri eitt væl størri virði, enn talan var um við JFK-handlinum*



**Skulu keypini av JFK og Vesturvón sammetast, stendur greitt, at goymdu kvotuvirðini í JFK handlinum eru væl størri enn hjá Vesturvón**

KEYP OG SØLA
*Jákup Mørk*

Síðani JFK handilin, har Hanus Hansen og Norðoya Sparikassi keyptu meirilutan av partabrøvunum í fyritøkuni, hevur støðugt kjak verið um, hvørt tað var rætt av Føroyagrunninum at gjøgnumføra handilin, uttan at hetta varð gjørt í almennum útboðið.

Millum annað hevur verið fýlst á, at eingin trygd var fyri virðisásetingini í handlinum, tá talan var um »lukkaðan« handil. Og frá nógvum síðum ljóðaði, at handilin snøgt sagt var farin fram til undirkurs.

Tað tosið fekk enn meira ferð á, tá Vesturvón herfyri varð selt til Framherja. Eftir øllum at døma fyri eina upphædd, sum var væl hægri enn tað, sum JFK-fyritøkan varð seld fyri.

Í Degi og Viku fríggjadagin staðfesti Leif Abrahamsen, nevndarformaður í Føroyagrunninum, at handilin við Vesturvón prógvaði, at JFK-handilin eisini var fram eftir marknaðarfortreytum. Men tað er ein útsøgn, sum væl kann hava sínar modifikatiónir.

## Skuldin skal roknast við

Vanligasti hátturin at gera upp virðið á fyritøkum, tá handlar av hesum slag skulu sammetast, er at seta upp roknistykki, sum tengir søluprís og skuld saman.

Virði á fyritøkuni verður tá upphæddin, sum eitt felag er keypt fyri - virðissetingin hjá keypara - umframt skuldin í felagnum. Tað skuldi á hendan hátt verið eitt úttrykk fyri samlaða virðið í felagnum. Tá ein keypsprísur so verður uppgivin, verður tað eitt úttrykk fyri nettovirðið í fyritøkuni.

Verður tað roknistykkið sett upp, so gevur hetta fylgjandi úrslit sambært teimum tølum, sum vit hava fingið uppspurt:

**mió kr.**

| | Vesturvón | JFK |
|---|---|---|
| Keypsvirði | 160 | 120 |
| Skuld | 20 | 190 |
| **Samlað virði** | **180** | **310** |

Í hesum skal tó havast í huga, at við keypinum av JFK fyritøkuni fylgdu tveir trolarar við loyvi í Barentshavinum. Tað eru serliga kvoturnar á hesum, sum hava verið orsøk til umrøðuna, og tí verður keypið býtt við tvey, gerst prísurin fyri hvørt loyvi 155 mió. Tað er altso 25 mió lægri, enn Framherji virðissetti Vesturvón til í sínum keypi.

Tær 25 milliónirnar kunnu helst vísast til, at vera virði á teimum fýra ísfiskaloyvunum, sum Vesturvón hevur í teimum báðum trolarapørunum, sum felagið eigur, og á tann hátt gongur roknistykki upp.

Men hartil, so skal eisini leggjast afturat tey virði, sum JFK hevur umframt teir báðar flakatrolararnar.

JFK hevur nevnliga eisini ræði á fylgjandi loyvum. Eitt pelagiskt loyvi, tvey ísfiskaloyvi og eitt rækjuloyvi umframt Kósavirkið, sum er næst størsta rávørukeypari- og útflytari. Tað vil við øðrum orðum siga, at skal samanberingin millum handlarnar framhaldandi gerast eftir hesum leisti, eru hesi loyvi at kalla komin ókeypis við í handlinum, tá JFK skifti eigara.

Ivaleyst er tað eisini hetta, sum norska blaðið Fiskaran, hevði í mentu, tá blaðið herfyri umrøddi keypið av JFK-fyritøkuni. Eitt keyp, sum blaðið skírdi fyri »tidernes tråler kup i Nordatlanten«. Altso besta keypið nakran tíð í Norðuratlantshavinum.

Vit royndu týsmorgunin at fáa eina viðmerking frá Leif Abrahamsen til omanfyristandandi, men hetta eydnaðist okkum ikki.

## Strámannavirksemi?

**Torbjørn Jacobsen setir nú á tingi fyrispurning, har hann vil hava at vita, hvørt landsstýrismaðurin hevur tryggjað sær, at lógarásettu eigaraviðurskiftini á kvotum verða hildin, ella um arvasilvurið í tilfeingisvinnuni verður avreitt á útlendskar hendur fyri tíð og ævir**

KVOTUR
*Jákup Mørk*

Í viðmerking til fyrispurningin staðfestir tingmaðurin, at søgan um einskiljingar og útlendskan kapital hevur fingið eina syrgiliga vend seinastu tíðina.

- Selt verður í duldum. Einki alment útboð er. Sum gongdin er nú, verða nakrar ognir fluttar frá almennum til privatan eigaraskap, meðan útlendskur kapitalur eftir øllum at døma fer avstað við tí partinum av privata vinnulív-inum, sum nakað virði er í.

Somikið bersøgin og hørð eru orðini í fyrispurninginum, og helt ítøkiliga nevnir Torbjørn Jacobsen søluna av Vesturvón.

- Tey flestu munnu hava ein varhuga av, at íslendsku áhugamálini eru størri í hesum málinum, enn higartil er komið fram. Tíverri hava fjølmiðlarnir ikki enn megnað at avdúkað - og hava heldur onga roynd gjørt fyri at finna út av tí heldur - um hetta er reint strámannavirksemi, sigur hann víðari í fyrispurninginum.

Tí vil tingmaðurin hava at vita, hvørt landsstýrismaðurin hevur gjørt ítøkiligar kanningar um, hvørt lógarásettu avmarkingar í eigaraviðurskiftunum í hesum handlinum eru hildnar. Hetta til at tryggja, at arvasilvurið í føroysku tilfeingisvinnuni ikki verður avreitt fyri tíð og ævir, staðfestir Torbjørn Jacobsen at enda.